

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 11 - 2011

# Ótti aftur á oljumarknaðinum

Oljuprísurin hevur nú í eina tíð ligið nakað oman fyri teir 100 dollararnar fyri tunnuna. Eitt skifti varð hann tó niðanfyri og eitt skifti væl hægri. Norski oljuanalytikarin Torbjørn Kjus sigur sambært Dagens Næringsliv, at ótti aftur er á marknaðinum, og at oljuprísurin helst skjótt fer at finna eina legu niðanfyri teir 100 dollarar fyri tunnuna. Prísurin var týsdagin 106 dollarar fyri tunnuna men seint týskvøldið var hann uppi á 109 dollarum. Norski analytikarin væntar, at altjóða fíggjarmarknaðurin fer at ávirka oljuprísin negativt. Hóast prísurin framvegis er væl omanfyri 100 dollarar, so roknar hann við, at prísurin fer at leggja seg niðanfyri teir hundrað dollarnar í næstu framtíð.